**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo

krabbameinsfelagið

# Móðurmerkjabólkurin

## Bólkur fyri teg, sum hevur ella hevur havt móðurmerkjakrabba



Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*

1. februar 2019



## SAMAN VIÐ ØÐRUM

At vera sjúk/-ur og fáa viðgerð fyri krabbamein kann vera sera tungt og ávirka alla tilveruna. Viðgerðin hevur ofta hjáárin við sær, og sálarliga kann tað eisini vera torført. Tú óttast fyri, hvussu alt fer at ganga, um viðgerðin fer at hjálpa o.s.fr. Hetta eru sera vanligir spurningar.

At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at tosa við onnur og seta orð á, so hvør kann siga frá sínum upplivingum. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á kenslum og tonkum. Lívsmótið  og lívsgóðskan økjast, og dagligu avbjóðingarnar verða lættari.



## UM BÓLKIN

Móðurmerkjabólkurin er ein bólkur fyri fólk, sum hava ella hava havt móðurmerkjakrabba.

Bólkurin varð settur á stovn, so at málbólkurin skuldi hava eitt  stað at hittast og fáa hjálp og stuðul frá øðrum í somu støðu.

Formaðurin í bólkinum tekur stig til fundir og hugnaløtur. Limirnir í bólkinum fáa innbjóðing við telduposti ella sms.

**Tað er ókeypis at vera limur í bólkinum.**

Hevur tú hug at gerast limur í bólkinum, ella hevur tú spurningar viðvíkjandi tilboðunum hjá Krabbameins-felagnum, kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 ella senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo